Fleyr-ÍF 3-1
23-25, 25-16, 25-21, 25-16

Fleyr basti storminum í Gundadali

At byrja vi› vóru trupulleikarnir alstórir, men tá alt kom til stykkis, megna›i Fleyr tó at vinna ein hampuliga tryggan sigur í ÍF

FLOGBÓLTUR

Dysturin í Gundaldalshøllini millum Fleyr og ÍF í meistardeilduni hjá kvinnum, var spennandi og gó›ur, men tó merktur av nógvum feilum. Li›ini liggja í mi›juni á stigatalvuni har Fleyr liggur á 4. plássi og ÍF á 5. plássi.

Hesi bæ›i li› hava ikki vunni› nógvar dystir í ár, og tí var umráandi at vinna henda dystin bæ›i fyri tey tvey stigini, men eisini fyri sálarligu styrkina. Sum á›ur sagt, so vóru nógvir persónligir feilir í dystinum, men Fleyr var li›i›, i› gjørdi færri, og tískil vunnu tær dystin.

ÍF leg›i hart út

ÍF byrja›i dystin ógvuliga væl, og ta› gekk skjótt fyri seg. Sum tá ein stormur herjar á oyggjarnar herja›i ÍF á í Gundadalshøllini, vi› at leggja seg á odda 1-8 í fyrst setti.

Fleyr damurnar gjørdu nógvar feilir og móttøkurnar vóru ikki serliga gó›ar. Fleyr tók seg tó meira saman, og ota›u tær seg meira at ÍF. Mi›skei›is í settinum gjørdist alsamt javnari, men at enda bragda›i koritni hjá ÍF, og vunnu tær sera tepurt.

FLEYR tók seg saman

Restina av dystinum st‡rdi Fleyr. Feilirnir vóru skúgva›ir til viks, men harafturímóti var ta› fuglfir›ingar i› gjørdu feilirnar. Hóast fuglfar›adamurnar stríddust væl, sum tær altí›gera, blivu feilirnir ikki færri, og nú tá Fleyr eisini s‡ndi betri hugbur›, var› ta› ógvuliga tungt hjá ÍF at koma fyri seg aftur. Anna› setti vann Fleyr ógvuliga sannførandi 25-16, men fjór›a setti› var› aftur meira javnt.

Randi Larsen, sum er eitt kent navn í føroyskum flogbólti, st‡rdi ÍF li›num. Hon var allasta›ni har bólturin var, og hon hevur eisini rutinuna til at lesa spæli›. Men hóast Randi gjørdi ta› hon kundi, so var Fleyr ta› betra li›i›, i› vann ein hóast alt uppibornan 3-1 sigur.



Fuglfar›agenturnar løgdu hart út, men tær megna›u slettis ikki at halda avrikinunum á einum nóg høgum stø›i
Mynd: Álvur Haraldsen

Fossánes - Mjølnir 0 – 3
10-25 15-25 8-25

Á gullkós

Enn ein tryggur sigur til greipuvinnararnar úr Klaksvík, sum enn halda beina kós móti fínastu hei›ursmerkjunum

FLOGBÓLTUR

Dysturin byrja›i rættiliga javnt, li›ini fylgdust til 6-6, men eftir ta› var stórur munur á li›unum og ta› var eingin møguleiki í nøkrum av settunum at ste›ga Mjølnirli›num. Vera Larsen i› vanliga spælir libero var ikki vi› og somulei›is sat Tina Jacobsen uttanfyri vi› ska›a.

Hetta tyktist tó ikki at nerva Mjølnirli›i› stórvegis.

Hóast Fossánes tapti stórt fyrsta setti valdi Fossánesvenjarin Jón Kári Frederiksen at spæla "sosialt" ella at royna allar spælararnar tvey tey næstu settini. Fossánes kemur neyvan at gera naka› vi› Dráttur og Mjølnir men móti Fleyr og TB kunnu tey fyrstu stigini koma um spælarnir eru meira frekir frammi vi› neti tí ofta eru bóltarnir alt ov lættir, tá sligi› ver›ur tvørturum.

TB-Dráttur 1-3
13-25, 15-25, 25-21, 24-26

Dráttur fór svevandi heim

Ta› stó› nógv á hjá Drátti, men eftir f‡ra til tí›ir spennandi sett, kundu tær loksns sta›festa, at stigini fingu tær heim vi › sær

FLOGBÓLTUR

Høllin í Trongisvági h‡sti tí mest spennandi dystinum í vikuskiftinum skuldi man gera eina meting eftir pappírinum. TB fekk vitjan av Drátti í meistardeilduni hjá kvinnum. Hesi bæ›i li›ini eru ávikavist nummar tr‡ og tvey. Dysturin fekk eina ógvuliga skuffandi og ke›iliga byrjan, men sum dysturin lei›, nærka›ist hann vónunum, og endin var›, at vágagellurnar drógu longsta strái›.

Dráttur domerandi

Dráttur hev›i taki› tey bæ›i fyrstu settini. Genturnar av Tvøroyri høvdu vánaligar móttøkur, og verjuspæli› var heldur ikki naka› at reypa av. Dráttur spældi heldur ikki upp til sítt besta, men tær kundu tó dúva upp á mistøkini hjá mótpartinum. Vi› ø›rum or›um so var TB slettis ikki vi› í dystinum, og hjá Drátti var ta› minimumslógin ta› snú›i seg um; tær gjørdu ikki meir enn ney›ugt.

Annar slingur í valsinum

Í tri›ja setti› bleiv alt endavent. TB genturnar tóku anna› skinn um bak, og byrja›u at spæla gó›an flogbólt. Bæ›i móttøkur og verjuspæl vór›u nógv betri, og hetta betra›i eisini um fyritreytirnar fyri álopsspælinum.

TB dugdi eisini at betur at lesa spæli› hjá Drátti, og genturnar frá Tvøroyri vístu síni kynstur sum blokaduleikarar. Ta› at tær megna›u at blokera meira, var eisini lykilin til stóru framgongdina, tí í flogbólti sigur man at man vinnur dystin frammi vi› neti› og ikki afturí á vøllinum. Selma Danielsen, i› spælir mitt fyri hjá TB, hev›i nú ein gó›an dyst frammi vi› neti›. Hon blokka›i ógvuliga væl, og í álopsspælinum var hon eisini sera effektiv. Hetta var sam$tundis fyrsti dysturin hjá TB har tey n‡ttu libero. Harriet Hammer leikti sum Libero og kom inn fyri Selmu afturí á vøllinum.

Selma fekk sostatt eisini høvi at hvíla seg av og á. Naka› sum eisini var vi›virkandi til, at hon stó› seg somiki› væl.

4. sett

Fjór›a og seinasta setti› var eins og ta› tri›ja, burtursæ› frá endaliga settúrslitinum. Bæ›i li›ini kempa›u væl, og ta› var sera javnt at kalla alt setti›. Dráttur heva›i nógv á mi›juna til Helgu Nordendal og tí ungu Sólger› Henriksen, og tá Marina Popovich fór aftur at serva. Stø›an var 24-23 til TB, men vi› gó›um sveviservum serva›i Marina sigurin heim til Vágagellurnar.

Fram-SÍ 3-0
25-16, 25-13, 25-18

Toppurin sigra›i!

Eingin sum helst ivi var um, hvat var betra li›i›, tá sørvingar vitja›u oddali›i›

FLOGBÓLTUR

Í dystinum millum Fram og SÍ var› ta› toppurin og botnurin í meistardeilduni hjá monnum sum møttust. SÍ hevur ikki fingi› rættiligt fótafesti í landskappingini í ár, og í hesum dystinum klára›u teir heldur ikki at gera so nógv um seg. Eftir bert 39 min. hev›i FRAM vunni› dystin 3-0.

Sama ni›urlagi ›

SÍ hev›i styrgt seg til hendan dystin vi› Jón Falkvard. Jón er ein evnaríkur ungur leikari, sum ikki hevur veri› vi› fyrr í ár , men nú ver›ur hann vi› restina av kappingarárinum.

Øll tr‡ settini høvdu sama ni›urlag. Fram spældi ikki ta› optimala teir eru førir fyri, men ísta›in royndu teir at leika meira á mi›juna til Heina Weihe og Suna Pedersen. Ofta kiksa›i ta› hjá Fram, vi› hevingum á mi›juna, men so var› heva› á kantin har bólturin bleiv vunnin. Leikarnir hjá Fram eru væl hægri enn sørvingarnir, og tískil fekk SÍ ikki blokka so nógv álop, men onkur einstakur blokkur var kortini. SÍ fekk nøkur álop ígjøgnum teir høgu menninar hjá Fram, men sum á›ur sagt, so var ta› Fram sum st‡rdi dystinum. Líti› er at siga frá dystinum tí mannagongdin var tann sama, og eftir pappírinum at døma so skuldi FRAM fingi ein tryggan sigur heim, og ta› var eisini júst ta› teir gjørdu.

Uttan naka› sum helst himpr gjørdi Fram sunundagin av vi › avbjó›ingina úr Sørvági
Mynd: Álvur Haraldsen

Fleyr-ÍF 0-3
24-26, 15-25, 19-25.

ÍF hóttir toppin!

Fuglfir›ingar vunnu grei›an sigur á monnunum hjá Fleyr, og nú tykjast teir rættiliga at hava sett kós móti toppinum

FLOGBÓLTUR

Á pappírnum fór dysturin millum FLEYR og ÍF at ver›a tann mesat javni og spennandi. Á›renn dystin lá FLEYR á 3. plássi og ÍF á 4. plássi. Hóast dysturin vísti seg at ver›a ógvuliga javnur í byrjanni og serliga í 1. setti› so vísti ta› seg at enda, at ÍF vann lættliga. Fuglfir›ingarnir kundu fara gla›ir nor› vi› einum 3-0 sigri

1. sett

Fyrsta setti› var ta› mest undirhaldandi og javnasta setti›. FLEYR kom best frá byrjan og leg›i seg framum, og var› frammanfyri helvtina av settinum. ÍF gjørdi nógvar persónligar feilir, og vanliga ver›ur hetta revsa›, tá spælt ver›ur móti Fleyr. ÍF kom skjótt aftur, og hálvegis í settinum var javnt í stigum. FLEYR tók anna› skinn um bak og vunni fleiri bóltar solei›is at stø›an bleiv 24-20 og harvi› f‡ra settbóltar. Leikandi venjarin hjá ÍF, Boban Ilic, tók eitt time-out nú stø›an 24-20, og ta› vísti seg at ver›a lykilin til vendingina. Bóltin aftaná time-outi› hjá ÍF vunnu fuglfir›ingarnir, og Bartal Eliassen fór aftur á baklinjuna at serva. Hann serva›i so miki› væl at ta› bliev javna út til 24-24 og hann serva›i eisin setti› heim.

ÍF ÍF og ÍF

ÍF byrja›i 2. sett har teir sleptu vi› fyrstu. Fuglfir›ingarnir komu skjótt frammum 1-4. Álopi› hjá FLEYR koyrdi ikki rættiliga, og nógvar misskiljingar ávirka›u spæli› hjá havnarmonnunum. ÍF var frammanfyri alt setti› vi› fleiri stigum, og tá spæli› hjá FLEYR ikki koyrdi sum ta› skuldi, so gekk ta› skjótt fyri seg. Tá nógv stó› á hjá FLEYR var› onkuntí› heva› á mi›juna til Steinar Eiriksstoft, sum so vann bóltarnar anna›hvørt vi› lobb ella einum gó›um smasji. ÍF koyrdi vi› nógvum kantspæli har ta› serliga vóru Boban Ilic og Bartal Eliassen i› vunnu álopini. Sum á›ur sagt so leg›i ÍF seg beinanvegin framum1-4 og ta› bleiv skjótt til 6-12, 10-17, 13-22 og endin var at ÍF vann 15-25. ÍF leikti ógvuliga einkult vi› at heva alt út á kantanar. FLEYR skuldi kanska roynt seg vi› at heva meira á mi›juna, tí ta› sum fór út at kantin kom ikki nógv burturúr.

ÍF trekti longsta strái›

Byrjanin til 3. sett var heilt ein onur enn tann í 2. setti. Li›ini leiktu eins væl og tey fylgdust allan vegin upp til 15-15. Bæ›i li›ini koyrdu teir flestu hevingarnar á kantarnar, og hjá Fleyr eru kantanir Klæmint Isaksen og Andrass Jógvanson. Smasjuni í hesum settinum vóru nógv har›ari enn í hinum settinum, og ta› var samstundis meira undirhaldandi at hyggja at. Tá stø›an var 15-15 og ÍF hev›i vunni› bóltin, fór Boban at serva. Hann serva›i ikki minni enn 6 servur á ra›. Fleyr gjørdi ógvuliga nógvar feilir, og tískil follu stigini lættliga til ÍF. Stø›an var nú blivin 15-21 til ÍF og FLEYR stabiliser›a›i seg aftur, men munurin var ov stórur og ta› enda›i vi› at Kenneth Neshamar sló sigurin heim til 19-25.

Samanumtiki› so var ta› ein vælfortjentur sigur til ÍF. Móttøkurnar hjá FLEYR lógu ikki so illa at tær ikki kundu hevast á mi›juna, og ein kann so spyrja seg sjálvan hví teir ikki brúktu sínar mi›leikarar meira tá ta› gekk so illa hjá høvu›ssjarunum. Fuglfir›ingar eru kendir fyri at ver›a ógvuliga treiskir at leika ímóti av tí at teir kjempa so væl á gólvinum og hesin dysturin var heldur ikki naka› undantak.

Meistaradeild, kvinnur

		d	v		t	Vunnin sett	Tapt sett	Sett-munur	stig
1	Mj¿lnir	4	4	-	0	12	2	10	8
2	Dr ttur	4	3	-	1	11	4	7	6
3	TB	4	2	-	2	7	7	0	4
4	Fleyr	4	2	-	2	7	7	0	4
5	Œ	4	1	-	3	4	9	-5	2
6	Foss nes	4	0	-	4	0	12	-12	0

Meistaradeild, menn

		d	v		t	Vunnin sett	Tapt sett	Sett-munur	stig
1	Fram	3	3	-	0	9	3	6	6
2	Mj¿lnir	3	2	-	1	8	4	4	4
3	Œ	3	2	-	1	7	4	3	4
4	Fleyr	3	1	-	2	4	7	-3	2
5	ŒE	4	0	-	4	2	12	-10	0